# Annnika skjýtur eftir gullinum



*Í stórum Robin Hood stíli hevur Annika Vang skotið føroyska recurve liðið á gullkós. Og sjálv var Annika týsmorgunin í hørðum stríði um gullmerkið fyri kvinnur*

**Við einum framúr góðum avriki frá Anniku Vang, var føroyska recurve-liðið á odda týsmorgunin, eins og Annika sjálv var næst fremst í sera javna oddastríðnum**

BOGASKJÓTING
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** Vindurin var av tí heilt keðiliga, tá bogaskjúttarnir mána- og týsdagin skutu FITA-rundurnar fyri lið og einstaklingar.

Soleiðis hálvgum aftan ífrá kom skiftandi lotið oman yvir skjúttarnar, og sum onkur tók til, so var tað trupult at skjóta, tá tú alla tíðina skalt medda eftir skivuni, sum stendur við síðuna av tínari egnu.

### Intens liðkapping

Men tað er ikki verri enn so, enn at treytirnar eru tær somu hjá øllum luttakarunum, og vindur er sum so heldur ikki nakað ókent fyribrigdi hjá føroyskum skjúttum.

Tað tykist tó ikki, sum verður talan um somu heiðursmerkjasavnan, sum tað so oftani áður hevur verið talan um, men nakað av metalli er tó í væntu.

Undan evstamarki okkara var størsti spenningurin í recurve, har Annika Vang eftir mánadagin hevði lagt seg heilt fram í oddin. Bara eitt stig skilti Anniku frá fremsta skjúttanum, og so skuldi ikki tað heilt stóra til í týsdagsumfarinum á styttru teinunum, um Anniak skuldi røkka heilt upp.

Og tað merktist eisini væl hjá liðnum, sum annars verður mett sum eitt hitt sterkasta recurve-liðið, sum Føroyar hava havt. Rógvi Mohr og Absalon Hansen vóru eftir mánadagin á ávíkavst fimta og áttanda plássinum, og samanlagt flutti hetta Føroyar fram á oddasessin. Men heldur ikki meira enn akkurát.

Her høvdu Føroyar 1231 stig. Orkney hevði 1227 og Hetland hevði 1222 stig. So tað skal ikki nógv ganga galið, áðrenn plaseringar verða mistar. Hinvegin kunnu vit sjálvandi eisini vóna, at hini londini kiksa onkran pílin, og so sær brádliga heilt gott út.

## Gull til liðini

Tað eydnaðist ikki at fáa endaligu úrslitini í bogaskjóting staðfest, áðrenn blaðið fór til prentingar, men undan seinastu 24 pílunum lógu bæði recurve og compound liðini til gull. Recurve-liðið var tá heili 45 stig framman fyri Orkney á næstfremsta plássinum, meðan compound-liðið, sum var væl aftan fyri Guernsey, var tá 36 stig framman fyri Guernsey.

Hjá kvinnunum lá Sigrid Vang trygt á einum triðjaplássi í compound, og hjá monnunum var Jógvan Niclasen í harðari kapping um silvurmerkið í compound.

Í recurve-kappingini var talan helst ikki um heiðursmerki til einstaklingar, men bæði Rógvi Mohr og Annika Vang vóru á fjórðaplássinum.
**jm**

## Heiðursmerki eftir mánadagin

| | | gull | silvur | bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Isle of Man | 12 | 6 | 7 |
| 2 | Jersey | 9 | 7 | 7 |
| 3 | Guernsey | 7 | 6 | 9 |
| 4 | Cayman Islands | 3 | 3 | 0 |
| 5 | Bermuda | 2 | 5 | 1 |
| 6 | Hetland | 2 | 4 | 4 |
| **7** | **Føroyar** | **2** | **4** | **3** |
| 8 | Gotland | 2 | 0 | 2 |
| 9 | Gibraltar | 2 | 0 | 1 |
| 10 | Isle of Wight | 1 | 4 | 5 |

# Liðið er tað týdningarmesta

**Vindurin órógvaði, og á mannfólkasíðuni verður talan helst ikki um heiðursmerki í FITA-umførunum. Men Sigrid Vang hevur skotið væl, og liðið liggur enn til silvur**

BOGASKJÓTING
*Jákup/Jens Kristian*

**Lerwick:** - Gloym Guernsey og gloym heiðursmerkini hjá okkum. Vit skulu halda fast um silvurmerkini.

Boðini frá Schandorff Vang eru ikki at misskilja, tá aðrir av føroyska liðnum royna at fregnast um, hvørt hann hevur flutt seg nærri heiðursmerkjunum týsmorgunin.

Nógvi vindurin órógvaði sjálvandi eisini compoundskjúttarnar, og tí vóru einstøk óvæntað úrslit at síggja á talvuni eftir fyrsta dagin. Ikki minst tann sannroynd, at Schandorff sjálvur og ævigi kappingarneytin, Billie Finnie, av Hetlandi vóru væl uttan fyri heiðursmerkjarøðina eftir fyrsta dagin.

Á mannfólkasíðuni var besta føroyska kortið eftir fyrsta dagin Jógvan Niclasen, sum var á sætta plássinum, meðan tað gekk nakað væl betri hjá Sigrid Vang á kvinnusíðuni. Sigrid var her nummar trý, og tí er tað fyrst og fremst her og í liðkappingini, at heiðursmerkjavónirnar liggja.

### Trygt silvur til liðið

Hjá liðnum tykist Guernsey annars at hava tikið seg sera nógv fram seinastu tvey árini. Soleiðis høvdu teir á mannfólkasíðuni tríggjar skjúttar millum seks teir bestu, og tað hevur givið eitt hampuliga trygt fyrsta pláss.

Skulu teir hóttast, so eru føroyingarnir tó næstir, men við inum muni upp á 40 stig undan skjótingini á teimum styttru teinunum, tykist hetta vera ein sera møtumikil uppgáva. Niðureftgir vóru 25 stig til Jersey á triðja plássinum.

## OYL-STØÐUR

**Borðtennis, lið**
*Bólkur B*

| | d | v | - | t | v dystir | t dystir | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guernsey | 5 | 5 | - | 0 | 27 | 8 | 19 | 10 |
| 2 Føroyar | 5 | 3 | - | 2 | 22 | 13 | 9 | 6 |
| 3 Jersey | 5 | 3 | - | 2 | 16 | 19 | -3 | 6 |
| 4 Grønland | 5 | 3 | - | 2 | 23 | 12 | 11 | 6 |
| 5 Áland | 5 | 1 | - | 4 | 7 | 28 | -21 | 2 |
| 6 Orkney | 5 | 0 | - | 5 | 10 | 25 | -15 | 0 |

**Badminton, lið**
*Undanbólkur A*

| | d | v | - | t | v dystir | t dystir | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Jersey | 2 | 2 | - | 0 | 9 | 1 | 8 | 2 |
| 2 Føroyar | 2 | 1 | - | 1 | 6 | 4 | 2 | 1 |
| 3 Gibraltar | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 10 | -10 | 0 |

**Flogbóltur, kvinnur**
*Bólkur A*

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Áland | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 3 Bermuda | 2 | 0 | - | 2 | 1 | 6 | -5 | 2 |
| 4 Orkney | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 6 | -6 | 2 |

**Flogbóltur, menn**
*Bólkur A*

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Áland | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 Føroyar | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 1 | 11 | 8 |
| 3 Gotland | 4 | 2 | - | 2 | 7 | 6 | 1 | 6 |
| 4 Grønland | 4 | 2 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 6 |
| 5 Hetland | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 4 |
| 6 Orkney | 4 | 0 | - | 4 | 0 | 12 | -12 | 4 |

**Fótbóltur, kvinnur**

| | d | v | - | j | - | t | v/mál | t/mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bermuda | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 13 | 0 | 13 | 6 |
| 2 Føroyar | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 3 Áland | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 3 |
| 4 Isle of Man | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 4 | 6 | -2 | 3 |
| 5 Hetland | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 9 | -9 | 0 |
| 6 Guernsey | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 0 | 14 | -14 | 0 |